Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 22.04.26
Mál nr.: 25/21617
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
Viðvíkjandi kontueigarum, ið eru løgfrøðiligir persónar, og sum ein ella fleiri persónar hava ræði á, kunnu upplýsingarnar eisini fevna um hesar persónar.	**1.** § 120 q, stk. 1, nr. 1, 2.pkt.verður orðað soleiðis: "Viðvíkjandi kontueigarum, ið eru eindir, og sum ein ella fleiri persónar hava ræði á, kunnu upplýsingarnar eisini fevna um hesar persónar, eins og tann ella teir leiklutir, sum gera viðkomandi til ein ráðandi persón í eindini."
	2. Í § 120 q, stk. 1, nr. 1 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Harumframt kann fráboðanin fevna um upplýsingar um, hvørt ein galdandi eginváttan er til taks, og um kontan er ein felags konta, og í so fall talið av felags kontohavarum."
Kontunummar, ella um einki kontunummar er, tað sum til praktisk endamál samsvarar við eitt kontunummar.	**3.** § 120 q, stk. 1, nr. 2 verður orðað soleiðis: "2) Kontuslag og kontunummar, ella um einki kontunummar er, tað sum til

	praktisk endamál samsvarar við eitt kontunummar.”
	4. Í § 120 q, stk. 1, nr. 7 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: “Viðvíkjandi pørtum av eginogn, ið ein íløgueind, sum er ein løgfrøðilig skipan, eigur, kann fráboðanin eisini fevna um upplýsingar um tann ella teir leiklutir, sum gera, at tann persónur, ið fráboðast skal um, er eigari av pørtum av eginognini.”
	5. Aftaná § 120 q verður sett: “**§ 120 r**. Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um, at veitari av kryptoognartænastum skal fráboða upplýsingar til TAKS um handlar, sum fevna um kryptoognir. *Stk. 2.* Landsstýrisfólkið kann áseta reglur um mannagongdir til at eyðmerkja kryptoognarbrúkarar, sum veitari av kryptoognartænastum skulu fráboða um. Harumframt kann landsstýrisfólkið áseta reglur um, at veitarar av kryptoognartænastum skulu forða kryptoognarbrúkarum í at fremja fráboðanarskyldugar handlar, um kryptoognarbrúkarin ikki letur veitaranum av kryptovørutænastuni tær upplýsingar, sum skulu veitast sambært reglum, ásettum við heimild í 1. pkt.”